*John d´Ancona, ovasti bretski "oljubossurin":*

# -Eg verði sera bilsin um tit ikki finna olju



*Frá fundinum í Norðurlandahúsinum týsdagin. Eftir innleggini hjá brretum kunda føroyingar tosa við teir um komandi samvinnu. Mynd kalmar*

*-Tað skal vera sera óheppið, um olja ikki finst á føroyskum øki, tá hon er funnin beint hinumegin markið sigur John d´Ancona, stjóri í OSO í Bretlandi. Hann heldur, at føroyingar og bretar hava nógv at samstarva um finst olja í øllum økinum millum Føroyar og Hetland. Sjálvur er hann bjartskygdur. Tíðindablaðið Sosialurin hevur tosað við hann.*

-Bretsku oljuøkini í dag liggja í Norðsjónum, men tekin eru til, at vit møguliga koma at fáa eina nýggja oljuprovins vestan fyri - á økinum millum Føroyar og Hetland. Hetta veldst so aftur um, hvat vit finna í økinum. Fyri at vita, um talan er um einstakar oljukeldur ella nakað heilt stórt eru vit noyddir at bora nógv fleiri hol og gera nógvar seismiskar kanningar aftrat.

Hetta sigur John d´Ancona, aðalstjóri í OSO, Offshore Supplies Office í Bretlandi, sum er hægsti stovnurin í Bretlandi, sum umsitur oljuvinnu. Hann kom til Føroya í gjár saman við eini mannsterkari bretskari sendinevnd.

## Bjartskygni

d´Ancona heldur, at øll eru sera bjartskygd um møguleikarnar at finna nógva olju vestan fyri Hetland. Oljuídnaðurin í Bretland leggur sera stóran dent á hesar kanningar leggur hann aftrat.

Upp á fyrispurning hvønn kunnleika ella vónir hann hevur um, at olja eisini er at finna føroysku megin miðlinjuna sigur d´Ancona, at tað hevði verið sera óheppið, um olja ikki finst í føroyska økinum, tá hon er funnin í grannalagnum.

-Tað hevði eisini verið rættuliga óvanligt. Hyggja tit at gongdini í Norðsjónum, so síggja vit, at norsku oljuøkini og tey bretsku liggja rættiliga nær hvørjum øðrum.



-Eg hevði verið sera bilsin, um tað finnast stórar nøgdir av olju bretsku megin markið, hvar so markið enn kemur at liggja, at olja ikki eisinier tykkara megin.

John d´Ancona vónar, at bretar og føroyingar kunnu fáa eitt gott samarbeiði í oljuvinnuni í framtíðini. -Tit hava eitt lítið samfelag, men harafturímóti hava tit sera vælútbúgvin og royndfólk og geografiskt liggja tit eisini sera væl fyri. Eg vildi mett, at er nógv til av olju okkara megin og tykkara megin markið, so eiga vit at arbeiða saman og hetta er eisini ein av orsøkunum til, at vit eru her.

## Føroyingar arbeiða í bretskari oljuvinnu

Hann heldur eisini, at føroyingar hava møguleikar at arbeiða í bretsku oljuvinnuna og somuleiðis útbúgva seg í Bretlandi. - Sum er eru nógvir útlendingar í bretsku olju vinnuni, so hví ikki eisini føroyingar spyr d´Ancona!

Upp á fyrispurning hvat hann heldur er endamálið við vitjanini sigur hann, at tað er fyrst og fremst at hitta fólkið her býr, at tosa við landsstýrið og umboð fyri politisku flokkarnar umframt at hitta umboð fyri vinnulívið.

D´Ancona vónar, at tað ber til at knýta samarbeiðsbond millum bretska og føroyska ídnaðin og leggur hann serstakan dent á møguleikarnar hjá bretum at lærea upp føroyingar í hesi nýggju vinnuni.

## Ikki ov tíðliga

*-Men er tað ikki nóg so tíðliga av tykkum at koma higar við eini sendinevnd og leggja upp til samarbeiði, nú tá vit enn ikki hava sett spónin í?*

-Tað er tíðliga. Men tá vit vóru í somu støðu sum tit eru í nú royndu vit at læra av amerikanarum, russum o.ø. Eg dugi ikki at siggja, hví hetta ikki eisini kann henda her hjá tykkum, har tit nú hava møguleika at njóta gott av okkara royndum.

Hann heldur tí, at vitjanin er upp á pláss bæði fyri føroyingar og fyri bretar. Vit vilja fegnir vita, hvat tit ætla, hvønn politikk tit fara at reka og hvat landsstýrið annars ætlar. Um vit kunnu vera til nakra hjálp, so haldi eg tað er gott.

D´Ancona vil ikki gera viðmerkingar til marknatrætuna millum londini. Hann vísir til samráðingarnar í desember og vónar, at onkur útviklingur fer at byrja á tí fundinum.

*-Men heldur tú, at trætan forðar fyri eini skilagóðari kanning av øllum økinum?*

-Tað verður torført at fáa veruligar kanningar í gongd fyrr enn markið er ásett. Tí haldi eg tað er avgerandi, at báðir partar sum skjótast royna at finna eina loysn, sum báðir kunnu vera nøgdir við.

-Eg sjálvur havi álit á, at partarnir finna eina loysn. Eg havi skilt, at bretska stjórnin hevur ongan áhuga í at vera provokerandi í hesum málinum men vil koma til eina semju við samráðingum.

## Hyggið at Hetlandi

Hetta er fyrstu ferð John d´Ancona er í Føroyum. Hann er føddur á Malta og honum dámar sera væl oyggjalond. Hann vónar, at gongdin í Føroyum fer at vera eins góð sum tann í Hetlandi, har fólkið hevur bygt upp eina oljuvinnu á sera skilagóðan hátt.

*-Men hvat hevur tú at siga til teir føroyingar, sum ber ótta fyri oljuni?*

-Tað er ikki mín uppgáva at siga føroyingum, hvat teir skulu halda. Men eg haldi tit skulu lurta eftir hetlendingum og hvussu teir hava handfarið henda spurningin sigur John d´Ancona við Sosialin.

jan

NÝTT
Til JÓLA

SMARTIR RUSKINNS-VESTAR
4–16 ár
199,-

DADDAN
SMS
TLF. 12138

KRUPS
HÚSARHALDSTÓL

| | |
|---|---|
| Minut-ur | 138,- |
| Hárturkarar | 198,- |
| Baðivekt | 228,- |
| Køksvekt | 268,- |
| Hondmixari | 298,- |
| Hondblendari | 358,- |
| Breyðristari | 368,- |
| Kaffimaskina | 368,- |
| El-ketil | 378,- |
| El-knivur | 388,- |
| Strúkijarn | 498,- |
| Breyðmaskina | 598,- |
| Hondmixari v. stativi | 798,- |
| Hvirla | 1198,- |
| Dustsugvari 1300 W | 1798,- |
| Mikrobylgjuovnur | 2898,- |

Partafelagið
DULAMENN
Dr. Jakobsensgøta 19
Tlf 19496 – Fax 19497